## Starv

# SKRIVARI

Strandfaraskip Landsins (SL) søkja við hesum eftir skrivara til stjóraskrivstovuna at seta skjótast gjørligt.

Stjóraskrivstovan er ein stápsdeild undir stjóranum og skal sum høvuðsuppgávu verða leiðslunia til hjálpar.

Á SL er talan um eitt desentralt arbeiðsumhvørvi við nógvum eindum runt um í landinum. Hetta hevur m.a. við sær ein stóran tørv á umsitingarligari samskipan. Ætlanin er tí, at vanliga skrivarafunktiónin eisini skal virka sum ein samskipandi funktión, har miðað verður ímóti at skapa felags umsitingarligar karmar.

SL hava í seinastuni knýtt eindirnar tættari saman við kunningartøkni. Hetta skapar betri fortreytir fyri at tryggja eina góða samskipan.

**Stjóraskrivstovan**
Stjórin á SL hevur ovastu leiðsluna og umsitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av virksemi stovnsins.

Ábyrgdarøkið fevnir eisini um langtíðar ráðlegging við ábyrgd fyri samskipan av ymsu deildunum og virkisøkjunum.

Stjóraskrivstovan hevur ein týdningarmiklan leiklut at samskipa dagligu umsitingarligu uppgávurnar hjá leiðsluni. Harafturat skal deildin verða við í teirri menning og nýskipan, ið SL hevur fyri framman.

**Skrivarastarvið**
Høvuðsuppgávurnar hjá skrivaranum eru:
- Avgreiða mál vegna stjóra ella leiðslu
- Stýra og umsita journal, hølisviðurskifti, kundamóttøku, postmóttøku og samskifti annars
- Avgreiða telefon og kalendara
- Avgreiða klagur
- Verða við til at fyriskipa, samskipa og lata upplýsingar av ymiskum slag
- Fyrireika fundir og vitjanir
- Gera fundarfrágreiðingar
- Innsavna og seta upp ymiskt tilfar
- Viðlíkahalda formularar
- Rættlestur

Harafturat kemur skrivarin at taka sær av skrivarauppgávum í sambandi við ymsar verkætlanir.

**Førleikakrøv**
- Ástøðilig útbúgving innan fyrisiting og handil, t.d. HH ella tilsvarandi
- Helst royndir innan fyrisiting og sum skrivari
- Kunnleiki og royndir innan kunningartøkni/edv á brúkarastøði (t.d. teldukoyrikort)
- Helst kunnleiki til journalisering
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum
- Arbeiða sjálvstøðugt og málrættað
- Góð samskiftis- og samstarvsevni
- Álítandi og góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum. Viðkomandi fær ábyrgdina av at menna eina samskipandi funktión og skapa felags umsitingarligar karmar. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:
Strandfaraskip Landsins
att.: Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn
og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 16. oktober 2000, kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Reidar Nónfjall, stjóra.
Tlf. 343000 ella e-mail: ren@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

# Pedagogur

**Margarinfabrikkin - virkishús fyri børn og ung søkir eftir pedagogi.**

Talan er um eitt 30 tíma starv ið skal setast tann 16. okt. 2000. Eftir 1. des. 2000 verður møguleiki fyri fulltíðarstarvi.

Margarinfabrikkin er eitt frítíðar- og virkishús fyri størri børn (8-12 ár) og ung (13-20 ár). Opið er gerandisdagar frá kl. 13 - 17.30 og frá 18 - 22. Kvøldvaktirnar verða býttar soleiðis, at tað verða 1 - 2 kvøldvaktir um vikuna.

Roynt verður at fylgja við menningini og tí nýggja rákinum ið rørist ímillum børn og ung. Samstundis sum roynt verður at geva teimum ábyrgd og samávirkan til virksemi í húsinum.

**Vit vænta**
at tú ert áhugað/ur í at arbeiða við størri børnum og ungum
at tú ert opin, vísir ábyrgd og ert postiv/ur
at tú hevur áhuga í skapanarevnum/ert skapandi
at tú vísir virðing fyri tínum medmenniskjum

Hóast tú ikki hevur pedagog útbúgving, men hevur royndir, dirvi og samstundis kann útinna omanfyri nevndu treytir, ert tú vælkomin at søkja.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Henrik Andersen, tlf. 312217, ímillum kl. 13 - 18 (tó ikki í viku 41).

**Umsókn**
saman við viðmælum, prógvum og upplýsingum um royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi týsdagin 10. okt. 2000 kl. 12.00.

Tórshavnar kommuna

## Asger Højlund

lærari á Meinigheitsfakultetinum í Århus talar um evnið:

**Kvinnuliga tænastan í meinigheitini**

í missiónshúsinum á Glyvrum í kvøld, leygarkvøldið 30.9. kl. 20.00 og í KFUM/K í Klaksvík í annaðkvøld, sunnudagin 01.10. kl. 18.00.

Høvi verður at samtala og seta spurningar um evnið.

Hjartaliga vælkomin!

## Ársveitslan

hjá Havnar Róðrarfelag verður leygarkvøldið 28.10.2000 kl. 19.00.

Tekning til veitsluna er mánakvøldið og týskvøldið 16. og 17. okt. millum kl. 19-21 á tlf. 210050 ella 218484.

**Havnar Róðrarfelag**

## Hjálparfólk/vaskifólk til ansingarskipanina í Runavíkar kommunu

Við tað, at Runavíkar kommuna hevur víðkata kommunalu ansingarskipanina, til eisini at umfata ansing av børnum í 1. fl., verður søkt eftir starvsfólki.

Hjálparfólk 20 tímar um vikuna.

Vaskifólk 2 tímar um dagin, sum eisini kann avloysa.

Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast frá dagrøktarleiðaranum á tlf. 448594.

Skrivlig umsókn skal vera Dagrøktini í hendi í seinasta lagi 06.10.2000.




**Dagrøktarskipanin í Runavíkar kommunu**
Heiðavegur
600 Saltangará

## Avloysari fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi

Søkt verður eftir avloysara fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi, 30 t. um vikuna, til eina stovu við 12 vøggustovubørnum frá 1. november 2000 til 21. apríl 2001.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur, sum er normeraður til 42 barnagarðsbørn, 12 vøggustovubørn, 8 pedagogar, 3 hjálparfólk og 3 stuðulsfólk.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 14. oktober 2000.

**Kongshavnar Barnagarður og Vøggustova**
**Heiðavegur · Postboks 119**
**Fo-600 Saltangará**



## Frá Runavíkar býráð

Í tíðarskeiðinum 02. okt. til 31. okt. 2000 verða ruskplássini í Runavíkar kommunu opin hvønn gerandisdag frá kl. 8.00 til kl. 19.00.

Gjørt verður vart við at vembur skulu vera tømdar áðrenn tær verða koyrdar í byngjurnar.




**Runavíkar býráð**

## Ársaðalfundur

Sagt verður frá, at árligi ársaðalfundurin hjá Róðrarsamband Føroya, verður í ÍSF-húsinum, leygardagin 28.10.2000 kl. 10.00.

Skrá samb. grein 4 í lógunum fyri Róðrarsamband Føroya.

**Róðrarsamband Føroya**

# Handverkari

**til brennistøðina**

**Arbeiðið**
er skipað í vaktum, og kemur tú m.a. at taka tær av ymiskum umvælingararbeiði, reinhaldi og viðgerð av burturkasti.

**Førleikakrøv**
Tann, ið settur verður í starvið, skal vera handverkari ella hava líknandi førleika. Neyðugt er at hava áhuga fyri umhvørvinum.

**Setunarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum millum Landsfelag handverkaranna og Føroya landsstýri

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Mikkjal Absalonsen, leiðara á Kommunalu brennistøðin, tlf 317582, ella Marius Müller, tekniska stjóra, tlf 315160.

**Umsókn**
saman viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 16. oktober 2000. Merk umsóknina "Brennistøðin".

Á Kommunalu Brennistøðini, ið er ogn hjá Tórshavnar Kommunu, starvast 13 fólk. Kommunala Brennistøðin tekur ímóti dagrenovatión og ídnaðarruski til brenning. Orkan frá brenningini verður nýtt í fjarhitaskipanini í kommununi. Bilar og jarn verður móttikið, umhvørvisviðgjørt, samantrýst, fyri síðan at verða sent uttanlands til endurvinningar. Vandamikið burturkast verður móttikið, pakkað og síðan sent til Kommunekemi til viðgerðar. Spillolja verður móttikin og víðariviðgjørd á IRF. Rottangar verða tømdir við KSA skipan.

Kommunala Brennistøðin er arbeiðspláss, ið stendur fyri stórum avbjóðingum fyri framman. Heima sum burtur verður lagdur stórur dentur á minkan av alheimsdálkingini. Tann, ið settur verður í starvið, skal hava áhuga fyri og kenna tað sum sýna ábyrgd at náða tey mál, ið givin eru, og sum kommunala brennistøðin arbeiðir ímóti.

Tórshavnar kommuna

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Mentamáladeildin**

# Vikarur fyri landsantikvarin

Við hesum verður starvið sum settur landsantikvarur lýst leyst at søkja. Setanartíðin er frá setanardegnum til 1. august 2001.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan hjá setta landsantikvarinum er at vera stjóri í Føroya Fornminnissavni, ið er undirskipað Undirvísingar- og Mentamálastýrinum og sambært lógum sínum skal virka fyri at:

- skráseta, kanna og hava eftirlit við jarðføstum fornminnum, sum lýst í løgtingslóg um friðing av fornminnum og bygningum
- fyrireika og standa fyri útgrevstri av toftum, fornum búplássum og søguligum lendum
- savna, skráseta og framsýna fornlutir og lutir frá nýggjari tíð, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan føroyinga til ymsar tíðir – ella eru knýttir til søguligar hendingar
- hava í hondum savnan av staðanøvnum og munnliga goymdum søguminnum – og hava hetta tilfar greitt til vísindaliga gransking
- hava eftirlit við bygdasøvnum og veita teimum hjálp og leiðbeining

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava lokna akademiska útbúgving í fornfrøði ella øðrum søguligum vísindum frá lærdum háskúla. Harumframt verður kravt at umsøkjarar hava leiðsluroyndir og kunnleika til savnsarbeiði. Granskingarroyndir innan søgulig, siðsøgulig ella samfelagslig vísindi eru ein fyrimunur.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera ágrýtnir, miðvísir og kunna arbeiða sjálvstøðugt – og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar skulu hava góðan kunnleika til føroyskt mál.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og samstarvi við aðrar stovnar og myndugleikar.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra (tel. 355050), ella Símun V. Arge, ið er settur landsantikvarur (tel. 310700), fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsókn við avritum av prógvum o.ø. skjølum, upplýsingum um leiðslu- og granskingarroyndir v.m. skulu vera Undirvísingar- og Mentamálastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. oktober 2000 – og sendast til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279 · 110 Tórshavn
Telefon 355050 · Fax 355056 · e-postur:
UMMS@UMMS.fo

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**Føroya Fornminnissavn er stovnur undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Skrivstova v.m. er í Kúrdali í Hoyvík. Framsýningar eru í Hoyvík og Brekkutúni. Savnið hevur samstarv við aðrar mentanarstovnar í Føroyum og er eisini uppi í millumtjóða samstarvi.**

*NÝTT í 3-aranum*



## *FÁ SKIL Á TÍÐINI*

## SKÚLA- OG ÍTRÓTTARTALVUR

**Høvuðsur, hjáur og ringiklokkur**
Hesi kunnu setast upp bæði innandura og uttandura. Ur og tíðtakaraskipanir til skúlar, fimleikahallir og ítróttarhallir.

Eisini hava vit eina meira framkomna skipan, sum verður stýrd við radio-signali ella GPS.

***3-arin umboðar ur- og lása-skipanir hjá Dansk Tidskontrol. Vit hava nógvar loysnir uppá ymsar ur- og tíðarskipanir, sum hóska til fyritøkur, skúlar, ítróttarhallir og virkir í ymsum støddum. Kom inn til okkara og fá eitt prát við okkum um tín tørv.***

3arin

*SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36*
*E-mail: tryarin@post.olivant.fo*

SANSIR · TEL 355 355

## NORÐURLANDAHÚSIÐ

## KLIPP

Filmsfelag Norðurlandahúsins

Møguleiki er fyri at síggja 7 norðurlendskar filmir í vetur

Fyrsti filmurin verður íslendski „Englar alheimsins"
frá 2000

**Mánadagin 02. oktober 2000 kl. 19.30**

Leikstjóri er Friðrik Þór Friðriksson

Eftir skaldsøgu hjá Einar Már Guðmundssyni 1995

Atgonguprógv fyri 7 filmir kosta kr. 250,00

Sí tekstvarp í SVF frá síðu 652.

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
**Telefon 317900 • Fax 319790**